# Fýrurin á Borðuni og fýrarnir í Nólsoy



**Tórbjørn Jacobsen setti Ovastevnuna í Nólsoya leygardagin**

OVASTEVNA

*Ttórbjørn Jacobsen*

Dagarnir eru farnir at styttast. Kappróðurin, rúsurin og sosiala samveran á summarstevnunum løgd aftur um bak á hesum sinni, nú tað líkasum verður tikið samanum her úti í Nólsoy, tá ið bygdarfólkið, avstaðsfólk og ein armada av bátum, í ein sólarring, hevur verið ávegis av Eiði til hesa stevnu, sum nólsoyingar hava skipað til minnis um ein av bygdarinnar stóru synum, Ova Joensen. Maðurin, ið framdi bragdið, sum ongin hevði gjørt undan honum, og sum helst ongin kemur at gera eftir hann. Við berari vøddamegi at flyta seg sjálvan úr heimlandinum til høvuðsborg ríkisins í stórsta listarverki føroyingar nakrantíð hava skapað, føroyska bátinum. Kom við skipi til Keypmannahavnar hetta sama kvøldið, stutt eftir at Ovi hevði kyst havfrúnna, og megin í róminum duldi ikki, at hetta einmansbragdið var søguligt. Tí er hetta ein vakur varði hansara bygdarmenn hava laðað um minni mansins, sum fór heim á tær ævigu veiðiakrarnar, ígjøgnum hitt váta elementið, stutt eftir tað, sum kundi verið byrjanin til ein føroyskan Thor Heyerdal, eina legendu á heimshøvunum.

Vit eru mangir sum hava miða okkum eftir fýrinum á Borðini. Táið komið var til lands av longum leiðum, táið leiðin lá til havs aftur og hesi endaleysu kvøldini táið ein hevur vála kring um í havnargøtum. Litteratarnir tóku hann eisini til sín. Tornið við heimsins enda, sum stjørnuskaldið undir Varða rópti hann. Soleiðis gjørdist hesin magnfulli viti alkendur í heimi, og nú hoyrdu vit í útvarpinum, at Oddvør fekk heiðursløn fyri skaldsøguna Sebastians Hús, harið krumtappurin er Borðan og hesi húsini, sum hon flytur haðani og inn í høvuðsstaðin.

Og her heima er fýrurin ivaleyst best kendur frá vísuni hjá Jóan Peturi, harið ungdómarnr vála omaneftir og niðaneftir í havnargøtum og harið teir, ið so víða hava farið, so lagaliga snakka fljóðini upp í lag ímeðan fýrurin á Borðini brestur í eyguni og vakir yvir teirra gerðarmálum.

Men fýrurin á Borðuni er ikki so einsamallur á oynni, sum hann tykist vera tað eina myrka vetrarnátt. Nólsoyarbygd hevur fostrað eitt meingið av fýrum, ella vitum, ið røkka hátt upp í vitskuni hjá øllum føroyingum. Menn ið hava flutt mørk til landsins frama. Ovi er ein av teimum. Taki aftur íaftur aðrar í ferðini.

Tjóðarhátíðin fór afturvið í vikuni, sum fór. Ólavsvøkan. Hetta klimaksið, ið onkursvegna hitar politiska kroppin í føroyinginum, og fær hann at síggja sjónir, ið bara eru til í ørandi fepuri. Prædikan hjá hvalvíkarpresti, einum fyrrverandi húsahávi úr Thy, gjørdist meira enn eitt intermezzo ímillum løgmansins, og harvið samgongunar, politiska vælsignilsið fyri teimum samkyndu í Grasagarði og sjálva løgmansrøðuna í løgtinginum.

Onkur spurdi hví nationalistarnir ikki rýmdu úr kirkjuni hendan dagin, tá ið Mogens Tilsted Christensen gav ríkisfelagsskapinum eitt rættiligt riddaraslag í dómkirkjuni á sjálvari tjóðarhátíðini. Ongar orsøkir vóru fyri tí. Á ein hátt er hetta besta ólavsvøkuprædikan, ið nakrantíð er hildin. Maðurin skar bara út í papp, hvør ið politiska støðan hjá Føroyum er í heimssamfelagnum. Sum eitt av hjálondunum, ið eftiri eru, í danska imperiinum. Maðurin tosaði danskt í eini danskari fólkakirkju. Tað var nú ikki meira enn rímiligt. Bað fyri ríkisfelagsskapinum áðrenn hann bað fyri Føroyum. Fyri kongshúsi, stjórn, ríkisumboðsmanni og fólkatingi áðrenn hann bað fyri landsstýri og løgtingi og fekk onkursvegna mana hesar 32 tingmenninar og 7 landsstýrismenninar fram sum gekkar í einum tragikomiskum donskum teatri. Hesir, ið erpnir sum hanar vóru komnir, við sjógv á baki, til Havnar, tí at teir hildu seg umboða evsta vald landsins, Løgtingið, og hitt útinnandi valdið, Føroya Landsstýrið. Og tá ið hann so segði hesi vælsignað val valdu orðini: Lad os f.eks. forestille os, at dronning Margrethe var til gudstjeneste her i kirken i dag. Måske ville hun så sidde i en særlig stol skjult for jer i kirken, men alene bevidstheden om hendes tilstedeværelse ville afgjort kaste glans over gudstjenesten. Dronningens herlighed smitter af og stråler ud i rumme som omfatter os, der er til stede. Således er også Guds herlighed, tá mundu fá eygu í hjálandinum vera turr, hjørtuni í teimum flestu ganga kyk og automatisku sjuntarnir á blóðtrýstunum geara seg uppeftir í allari herligheitini. Ikki sørt at hetta gav onkrum assosiatiónir aftur til tey gomlu samfeløgini í Egyptalandi, Mesopotamien, Kina, hjá aztekarunum og inkarunum, í hinum precolombianska Amerika og í afrikanskum kongsríkjum harið dekretir og diktatir vórðu varpaði niður yvir fólkið frá einaveldisharrum, traditiónum og prestaskapinum, ið søgdu seg vera staðgongumenn guðanna, tíðin áðrenn grikkar fóru undir at fjasast við hin revolutionera tankan um at koppa pyramiduni á, og geva fólkinum ræði á samfeløgunum, sum tey áttu og búleikaðust í. Ein leiklutur sum føroyska fólkið enn ikki hevur átikið sær. Eigur á. Eitt løgið konsept má tað sigast at vera, at hitt danska demokratiið hevur sama leiklut í Føroyum, sum faroarnir høvdu í Egyptalandi fyri túsundum av árum síðani.

Og tá ið so løgmaður løtu seinri hevði tikið sær mót til at røða fyri øðrum enn teimum sum møttu í Grasagarði kvøldið fyri, og boðaði frá, at føroyska skútan var løgd fyri íla í tryggari danskari havn, og varð liggjandi har í nøkur ár frameftir, tóktist alt at vera fullkomið. Geistligheitin og politiska valdið vóru gingin upp í eina hægri eind. Ein hevði varhugan av, at ekvivalensur var ímillum heilamegina hjá teimum báðum Mogensi og Jóannesi, alt í ríkisins tænastu. Og nú liggja vit har. Tað guvar sáttliga úr roykhanusi frammi á hvalabakinum. Eitt havnaagregat gongur bara, fyri at ljósini ikki skula slókna. Onki er so víst sum tað, at tjóðskaparmenninir í Føroyum fáa úr at gera í komandi árum.

Men ongin megnar at forða tjóðarbyggingini. Leiðini fram til sjálvræði. Heldur ikki í Føroyum. Og nólsoyingar hava ikki staðið í aftastu røð í so máta. Sum Pløyen amtmaður sigur í Grindavísuni: "Nolsinger kan man lide på, de tiden ej monne spilde. Udgik at holde til fjelds de gå, og det både årle og silde."

Ein av landsins stóru synum vaks upp í bygdini. Nólsoyar Páll. Fyri tveimum døgum síðani vóru tað 200 ár síðani Royndin Fríða fór av bakkastokki suðuri á Fløtuni Fríðu í Vági. Fyrsta havgangandi far í nýggjari tíð sum var smíða í Føroyum. Og ein liður í bardaganum hjá Pálli at menna korini hjá føroyingum. Tað skula heilt serlig evni, dirvið og áræðið til at ganga ímóti eini fastlæstari skipan og eini massivari yvirmakt soleiðis sum hesin nólsoyingurin gjørdi tað, og tó at hann lítið og onki fekk burturúr sínum átøkum sjálvur, so flutti hann nakrar markapelar og gørdist ein lýsandi kyndil fyri komandi ættalið, líka fram til okkara dagar.

Vandin í at nevna nøvn er gloymskan um onkran oddvita sum basti øllum mótgangi. Vann framá og slóðaði ræsur fyri føroysku tjóðina. Men Tróndur á Malarenda var ein fínur skribentur, ídag kanska best kendur fyri vísuna: Í Gøtu ein dag, sum hann yrkti til lagið: Velkommen igen, du Danmarks Fiende og hin vakra sangin: Her er dámligt í Føroyum um krossmessutíð. Og hóast hann mesta partin av lívinum var útlagin, so misti hann ikki stevið og samleikin, tíansheldur málsliga førleikan og tað sigst at hann onkuntíð var meginskaldinum, fræga málmanninum, Janusi Djurhuus, hollur vegleiðari í málsligum spurningum.

Ein maður sum vit hoyrdu nógv um í mínum ungu døgum var fuglamaðurin og útstapparin Niels á Botni. Eisini eitt serligt fyribrigdið í Føroyum. Ein maður sum víðkaði mørkini og gjørdi oyggjarnar kendar úti í heimi.

Maria Eide, dygg í mentan, legði væl eftir seg og ein tann besti málarin sum tjóðin hevur fostrað mundi vera slektaður hiðani og hevur við sínum penslastrokum lýst oynna, sum ongin annar kann gera tað. Steffan Danielsen. Unikkur. Minnist hann frá skúlaárunum í Havn í sjeytiárunum. Tað sást á meðferðini, gongulagnum, bráðnum, at hetta var ein av teimum stóru orginalunum, sagt í lívsins bestu merking. Tað skal vera mín vón at góðar kreftir taka seg saman og smíða ein listaskála her úti í Nólsoy, soleiðis at málningarnir hjá Stefani, hópur av teimum standa uppi hjá Emil veit eg, fáa tað heiðurspláss ið teir hava uppiborið. Samstundis kundi hetta verið ein magnet í eini blómandi ferðafólkavinnu, sum hendan oyggin av øllum, eigur at fáa sín stóra lut í. Og nú eg nevndi Emil. Emil Juul Thomsen. So má eg bara staðfesta, at tað er bara ein Emil. Harvið er hann eisini ein av hesum positivu orginalunum, sum meira enn teir flestu hava lagt lunnar undir føroysku tjóðina. Hansara verk er alkent víða um lond. Tað er ikki meira enn at hann knógvar undir allari tí virðing og tí heiðuri, sum fróðarmenn og setur og landastjórnir havi latið honum í fremmandum londum. Meiri striltið hevur gingist í Føroyum, her sum øvundin liggur meira trá enn aðrastaðir. Men umsíðir tók Føroya Løgting seg saman, fyri fáum mánaðum síðani, og veitti honum tann heiður, ið hann meira enn nakar hevði uppibornan. Ein úrmælingur, hvørs lívsverk er skapað av alski til føroyskt mál og til ta føroysku tjóðina, tí man tað kennast sum brennandi svullur hjá hesum hugdjarva manni at prædika verður aftur á donskum í føroyskum kirkjum, at sjónvarpsleiðslan ætlaði at umskipa landsrásina til ein danskan fylgisvein og fyri alt tað, at samgongan hevur lagt tjóðskaparskútuna fyri íla aftur í tryggari danskari havn.

Nólsoyggin er fyritreytin fyri at høvuðsstaðurin er har, ið hann er. Nú verður alt ein kommuna. Og fólkatalið sær út til at halda stand, eitt sjaldsamt fyribrigdið á útoyggj ídag. Men her eitt ríkt lív. Ímillum menniskju, í bø, haga, bjørgum og á sjógvi. Oyggin hevur fostrað eitt ótal av góðum sjófólki og hesi seinastu árini tykist tað sum um, at hon er vorðin eitt slag av einum metropoli, einum slaraffenlandi, hjá evnaligum tónleikarum. Her fáa teir íblástur. Sangarar, guitaristar, trummusláarar og keyboardspælarar. Og tað fræettist, at bygdin er á tremur av dugnaligum kjallaraorkestrum, sum vit helst fara at hoyra meira til í framtíðini.

Tað sigst at tað ongastaðni í landinum eru so nógvir orginalar sum í Nólsoy. Uppá seg. Og tað er gott. Tann dagin orginalarnir doyggja út í Føroyum, tá verður gerandisdagurin tristur, gráur og tungur at koma ígjøgnum. Kopiini fylgja bara tropp, flyta ikki mørk eins og orginalarnir, nakað sum er neyðugt skal samfelagið mennast. Tí mega vit ansa eftir at vøggustovu- & barnagarðskultururin ikki gerst ein mainstream íðnaður harið alt kemur útaftur í hinum endanum við einum nummaspjaldrið á ryggginum og ongum serligum frábrigdum. Og tit mega svørja eið við allar aðrar føroyingar, at tit ongantíð sleppa hesi fantastisku dialektini, sum er so lívgevandi, og sum gevur sjálvt eini rockfløgu hjá Moirae eina serliga dimensión, hugsi serliga um hin vakra sangin Lognbrá, harið Kim í besta Elton John stíli syngur um malar"grauti", ímeðan fingrarnir so smeðið og lættliga fúka eftir klaviaturinum.

Nólsoyingurin vann ikki føroymeistaraheitið í kapproðri í ár. Tíanverri. Næst eftir Eysturoyinginum havi eg altíð hildið við 10-mannafarinum hiðani. Og tað kemur ikki av ongum. Tí man eg vera boðin higar ídag. Ein partur av blóðinum kemur hiðani. Men hegnið og eygamálið hjá oldurabbanum fall mær ikki í lut. Eri sum kúgv í trappu tá ið tað kemur til handverk. Men hendurnar á Jóhan í Garði mundu liggja nakað væl á takinum. Skyldmaðurin Hans Pauli í Hvannasundi, sum var abbasonur hansara, sigur í endurminningum sínum, at nólsoyingar søgdu honum, at okkara felags forfaðir skuldi smíða omanfyri 900 bátar tilsamans. Tá ið hann var 97 ára gamal helt hann seg hava arbeitt nóg mikið og legði seg upp í lokrekkjuna at doyggja. Mettur av døgum. Hann var giftur við Suffíu Augustinusdatter undan Gøtueiði, sum Viderø sigur um í Eysturoyar Saga, at tá ið hon á Jóansvøku fór niðan á Støðlafjall at dansa, tá hekk mykja uppi í klæðum hennara. Hon hevði svá skunda sær í fjósinum at mjólka og sópa til tess at fáa hini aftur. Og dansurin, føroyski dansurin, hevur eisini sína serligu søgu í Nólsoy. Borðin fram ígjøgnum ættarliðini. Hesin dýrur arvur. Meginsúlan undir tí málsliga førleika, sum er lívæðrin í samleikanum, ið ger, at menniskju yvirhøvur búgva og virka í hesum landinum, eisini her úti í Nólsoy.

Tá ið oldurabbin var komin nakað væl upp í árini sendi Jóannes Bóndi honum hesa yrkingina, ella heilsanina, sum hann sjálvur hevði sett saman:

*Skeggið gránar,*
*sjónin viknar,*
*kropna kongar,*
*holdið bliknar,*
*enn er tú tó*
*kappin hin rammi.*
*Frá tí tú seym*
*á høvdið slóg,*
*frá tí tú knív úr slíðra dróg,*
*stóðst tú*
*í bátssmíði frammi.*

*Meistari var tú*
*av øllum í vali,*
*bátar tú smíddi*
*í hundrað tali,*
*hvør bar av øðrum betri.*
*Nú kvøði eg*
*tær heiðursljóð,*
*fyri títt verk takkar*
*Føroya tjóð,*
*Nú ævin tín*
*stundar mót vetri.*

Sonur Jóhan, langabbi mín, Poul Niklái Danielsen, sum eisini var bátasmiður og harumframt skipari, útgerðarmaður og hevði sín egna skiparaskúla, flutti inn á Skálafjørðin at búgva og soleiðis kom slektin innaftur tann vegin.

Havi nevnt nakrar vitar, sum Nólsoyggin hevur fostrað, og teir eru uppaftur fleiri, sum hava verið slóðarar og hava verið við til at lyft og ment tjóðina fram til tað, sum hon er ídag. Ovi er farin, men bragdið hann framdi á føroyskum kjøli verður ongantíð gloymt. Tí er tað tykkum ein heiður, at skipað verður fyri hesum átakið, ið kann menna trivnaðin hjá bygdarinnar ungdómum. Soleiðis at teir mennast til mans og kunna gera Føroyar til ein kappingarføran part í tí pulserandi alheimi sum sýgur alt lív at sær. Vitin á Borðini verður eisini standandi, men hann er ikki tornið við heimsins enda sum William Heinesen fabuleraði um í sínum barnaárum, hann er bara fráfaringarrampan út í ein stóran heim, sum kanska stendur og bíðar eftir uppgerðini við faraoararnar í Keypmannahavn og eftir at veruligt fólkaræði verður skipað í landinum - á føroyskum grundvølli sjálvandi. Alt annað eru and- & tvørsagnir, ið ikki hilnast og sum ongi beitisrættindi eiga. Hvørki her ella aðrastaðir. Hervið er Ovastevnan 2004 sett.



